# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samfelagsligar raðfestingar

Universitet okkara, Fróðskaparsetur Føroya, er í andróðri. Tey lesandi og vísindaliga starvsliðið koma við hvøssum atfinningum til politikkarar landsins. Tað má ásannast, at í eini tíð, har tørvurin á hægri útbúgvingum er stórur úti sum heima, er tað hugstoytt, at einasta universitet okkara noyðist at skerja virksemið. Henda skerjing merkir sum kunnugt, at lesandi ikki verða tikin inn á Søgu- og samfelagsdeildina komandi lestrarár. Okkurt kundi samstundis bent á, at deildin verður niðurløgd.

Vit skula gerast eitt vitanarsamfelag burturav og eiga tí at raðfesta gransking, nýmenning og hægri útbúgvingar. Her eru øll samd. Men altjóða fíggjarkeppan hevur endavent øllum, og politikkarar svara við at skera niður á fíggjarlógini. Hetta gongur út yvir alment virksemi, eisini útbúgving og gransking - spell, tí vit missa nakað niðurímillum, hvørja ferð vit fáa hesi nosini, og tað tekur sum kunnugt ár at vinna inn aftur tað mista.

Vreiði teirra lesandi vendir sær ikki óvæntað móti landsins stjórn, ið eftir teirra áskoðan játtar ov lítið. Tað er nú í hesum føri fíggjarnevndin, ið hevur tilevnað galdandi fíggjarlóg í endaligum formi, so tað er tann vegin ábreiðslurnar skulu vendast. Hinvegin er Setrið ein sjálvstøðugur almennur stovnur, hvørs leiðsla sjálv raðfestir virksemið innan fíggjarkarmarnar. Leiðslan hevur valt at raðfesta soleiðis, at Søgu- og samfelagsdeildin situr eftir við svartaperi. Hvør er veruliga orsøkin er til hesar raðfestingar? Løgtingið hevur við nýggju universitetslógini signalerað, at framyvir skal fyrilit vera fyri samfelagsligum raðfestingum. Hetta merkir, at leiðslan, um hon dugir at avlesa politisku signalini stýrir samsvarandi ella fellur fíggjarligi hamarin.

Sama leiðsla, sum nú lækkar virksemi á Søgu- og samfelagsdeildini niður á anaran, hevur sett fleiri nýggj akademisk størv innan onnur øki á lærustovninum. Kanska hevur leiðslan hugsað sum so, at nú er fyribils nóg mikið av mastarum í søgu og samfelagsfrøði – okkum tørvar aðrar útbúgvingar. Havast skal eisini í huga, at leiðslan nú eisini hevur ábyrgdina av útbúgvingini av fólkaskúlalærarum, pedagogum og sjúkrarøktarfrøðingum – alt øki, har tørvurin á uppstiging og førleikamenning er mestsum óavmarkaður. Er hetta orsøkin eru raðfestingarnar innanstovns sakligar, hóast tær pína. Eru aðrar orsøkir, eitt nú høgleikafyritlit t.d. ósett størv, orsøkin, hevur leiðslan ein trupulleika. Søgu- og samfelagsdeildin eigur ikki at verða niðurløgd, men eigur at halda fram við gransking og at taka lut í førleikamenningini av øllum økinum, serstakliga lærara- og pedagokøkinum. Lesandi eiga at verða tikin inn aftur í seinasta lagi 2010, tí uttan lesandi riggar gransking ikki í longdini. Og latið okkum so fáa eitt alment orðaskifti um samfelagsligar raðfestingar av gransking og hægri útbúgvingum og latið onkran uttanveltaðan taga dagar millum Setrið og fíggjarnevndina, so almenningurin fær sannleikan um hetta løgna mál.

**Sosialurin**

### Hægri útbúgving onga raðfesting

## Søgu- og Samfelagsdeildin við skerdan lut

Í hesum tíðum tykjast landsins myndugleikar at vera uttan mál og mið. Hetta er støðan á Fróðskaparsetrinum eitt greitt dømi um. Spyrjast kann, hví einasta deildin á Fróðskaparsetrinum, ið hevur til endamáls at granska og menna føroyska søgu- og samfelagsvísind skal leggjast í dvala?

Søgu- og Samfelagsdeildin er einasta universitets deild í heiminum, ið hevur til endamáls granskað føroysk samfelags viðurskifti burturav. Sum lesandi kunnu vit fara á hægri læristovnar í útheiminum, men hetta er ikki nøktandi fyri tann, ið vil sleppa at granska í føroyskum viðurskiftum.

Einki skynsamt høpi tykist vera í, at lesandi ikki vera upptikin á søgu og samfelagsdeildina aftaná summarfrítíðina. Serstakliga tá hugsað verður um arbeiðisloysi í landinum og fráflytingina av ungdómi. Tað er ein sannroynd, at fólk stóðu í kø til at sleppa at lesa á søgu og samfelagsdeildini aftaná summarfrítíðina. Framtíðin tykist vera óviss, og fleiri mugu tí uttan iva leita sær av landinum. Hetta stendur í greiðari andsøgn til allar visiónir um, at skapa fyritreytir hjá ungdómi at støðast í landinum.

**Eingin M.A. lestur**

Fyri okkum, ið verða liðug við Bachelor útbúgving í summar, er støðan sera óheppin. Fleiri høvdu ætlanir um at fara undir masterlesnað í Føroyum, men hetta sær í løtuni ógvuliga svart út. Spyrjast kann, hvørjum endamáli tað tænir, at ikki loyva fólki at gera seg lidnan. Ein B.A. Útbúgving í sær sjálvum er ikki nøktandi á arbeiðsmarknaðinum. Søgu og samfelagsdeildin hevði møguleika til at hava masterlesandi innskriva, so hvørt hesi tóku eitt síðufak, hesin møguleikin er nú eisini burtur. Hjá teimum ið bert vanta at skriva sjálva masterritgerðina, kemur hetta eisini sera illa við, tí tey kunnu koma at standa uttan nakran fakligan vegleiðara.

Nú tá vit mugu søkja um upptøku á lærustovnum uttanlands, stinga fleiri trupulleikar seg upp. Í fleiri førum eru umsóknarfreistirnar longu farnar, og har freistin ikki er farin, fer hon innan stutta tíð. Sum kunnugt er eisini neyðugt við studningi tá ein fer av landinum at lesa, og nú tá tað stendur greitt, at Søgu- og Samfelagsdeildin ikki tekur inn, verður sera torført at fáa hesar stuðulsmøguleikar at hanga saman.

**Fjarlestur sum undanførsla**

Landstýrisskvinnan í Mentamálum segði í Degi og Viku 30. mars, at tey, sum vilja lesa víðari, kunnu møguliga gera hetta sum fjarlestur í samstarvi við Fróðskaparsetrið og annan stovn uttanlands, men stóri spurningurin er, um eitt tílíkt samstarv kann fáast upp á pláss áðrenn summarfrítíðina? Tað er ikki sannlíkt, tí tað er ikki fígging til fjarlestur í játtanini til Setrið!

Nógv kjak hevur verið um, at føroyingar fara uttanlands at lesa og verða verandi har. Við at raðfesta Søgu- og Samfelagsdeildina, hevði ein partur av hesum trupulleika verið loystur, áðrenn hann stakk seg upp! Hóast tað er torført hjá lítlari tjóð sum Føroyar, at borðreiða við øllum teimum lestrar tilboðum størri lond kunnu borðreiða við, átti tað at staðið greitt, at vit ikki kunnu loyva okkum at niðurraðfesta tað, ið longu hevur víst seg at virka væl.

Vit heita tí á øll – ung sum gomul – um at stuðla okkum við at møta fjølment upp til mótmælistiltak ímóti fyribils niðurleggingini av Søgu- og Samfelagsdeildini. Mótmælistiltakið verður á Vaglinum í Havn fríggjadagin 3. apríl kl. 16.00.

Við lestrarkvøðu vegna tey lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini,

***· Janus á Ryggi - B.S.Sc lesandi í stjórnmálafrøði***
***· Kristian Joensen - B. S.Sc lesandi í stjórnmálafrøði***
***· Guðrið Krúnufjall - B. S.Sc lesandi í stjórnmálafrøði***
***· Jóhanna Vágadal Joensen - BA lesandi í søgu***
***· Maria Kristina Smith – BA lesandi í søgu***

## Teistin má røkja sjúkraflutningin

**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður



Ja nú er so aftur eitt álop á útjaðaran. Nú meinar leiðslan á Landsjúkrahúsinum, at tað ikki er neyðugt, at Sandoyggin hevur ein sjúkraflutning.

Teistin hevur havt, og teir bátar, sum vóru áðrenn hann, ta uppgávu at vera tilreiðar á nátt at føra sjúk fólk.

Hetta metir leiðslan á Landsjúkrahúsium ikki at vera neyðugt. Í staðin ætla teir at seta lítla bjargingarbátin »Lív« inn í staðin, hetta er ein bátur, sum ikki er so frægt á sama støði sum »Reyðikrossur« sum silgdi fyri 40 árum síðani.

Er hetta tí, at leiðslan á Landsjúkrahúsinum ikki fylgir so frægt við, at hesin bátur slettis ikki kann brúkast um Skopunarfjørð.

So kunnu teir grundgeva við, at báturin siglur í øllum veðri, minnist til at tað eru sjúk fólk, sum hann skal flyta, ella meta tit hesu fólk sum kríatúr?

Eg havi tosað við tann politiska myndugleikan, so eg eri yvirbevístur um, at Teistin fer at røkja hesa uppgávu víðari.

Tá talan er um tyrluna, má eg siga, at ta skipanina hava vit roynt, og kann hon ikki brúkast.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.